# Útseldir jóla- og vetrartúrar



Nógvir danir velja at halda jól uttanlands. Serliga væl umtókt er Thailand, men trupult er eisini at fáa ferðaseðlar til Suðuramerika.

Serliga til Thailands er stórur vøkstur at síggja í teim ferðandi. Herviliga tsunami'in heldur ikki fólki aftur í at fara hagar. Mett verður at einir 70.000 danir fara hagar í vetur.

Bæði á jólum og í vikunum 7 og 8 næsta ár er trupult at sleppa úr Danmark og til tey kendu ferðamálini.

Ætlar ein sær hinvegin ikki til tey kendu og vælumtóktu ferðamálini eru møguleikarnir fleiri. Bæði til tær Kanarisku Oyggjarnar og Egyptaland eru ferðir eftir, og hevur ein hug at ferðast uppaftur longri, til t.d. Kenya, Indien og Suðurafrika er møguleikin størri fyri hesum.

Ein orsøk økta áhugan hesi jólini er uttan iva hon, at jólini fella soleiðis, at talan verður um eina langa frítíð.

























